


### Seks kvinnur, seks søgur
### Í Territorial Statements hitta vit:

Ungu kvinnuna, sum verður meir og meir frustrerað av, at vinkonan altíð er meir upptikin av sínum barni enn at vera saman við sær.

Iransku gentuna, sum verður noydd at taka støðu til, um hon skal fara við foreldrunum aftur til Iran, um kollveltingin gerst veruleiki.

Føroysku kvinnuna, sum ein vanligan gerandisdag knappliga skal verja sín tjóðskaparliga samleika yvir fyri eini púra fremmandari kvinnu.

Kvinnuna, sum uttan at vita hví, knappliga fortelur persónligu søguna um sín hjúnarskilna fyri einum, hon ikki kennir serliga væl.

Ungu kvinnuna, sum framvegis pínist av eini hending, har hon ikki gav sær tíð til at hjálpa einum skaddum manni, sum bað hana um hjálp.

Afrikansku kvinnuna, sum ikki fær sín nærgangandi granna at skilja, at hon ikki er áhugað í honum.

týðiligt at søgan broytir dám, tí kvinnan er glað, spent, ill ella keðir seg, men eisini tá onki av hesum hendir, tá søgan eftir øllum at døma verður søgd orðarætt umaftur, fata vit hana kortini øðrvísi. Og kanska, kanska ikki verður tú, sum frá líður, greið yvir, at tínir egnu fordómar eru vorðnir partur av listaverkinum.

– Vit hava øll eina rúgvu av fastløstum mynstrum við í okkara visuella viðføri. Vit kenna altíð ein dokumentarfilm aftur, vit vita, hvat vit kunnu vænta okkum av eini heimavideo ella eini tíðindasending, og í einum gysarafilmi er ljóssetingin nokk til at geva okkum gásahúð. Í filmsheiminum er tað ein viðtikin lóg, at formurin skal hóska til innihaldið - tú finnur til dømis ikki uppá at taka eina tíðindasending upp við gysaravinklum og -ljósið, sigur Birgit.

Í Territorial Statement er tað formurin, sum skapar innihaldið. Ella tað vil siga - okkara væntanir til formin skapa nýggjar væntanir til innihaldið. Velja vit at ganga við uppá nýggju treytirnar, fáa vit eina nýggja søgu hvørja ferð - eitt listaverk, um vit vilja, har gerandisdagurin hevur fingið eina røð av nýggjum týdningum.

### "I'm so fucking happy"

Á ein meir beinleiðis og ágangandi hátt halda listakvinnurnar fram at kanna, hvar okkara mørk ganga í stutta filminum "I'm so fucking happy", sum koyrir uttan steðg á einum lítlum skíggja. Í filminum verða tilvildarligar kvinnur steðgaðar á gøtuni og bidnar um at siga "I'm so fucking happy" framman fyri einum upptøkutóli. Summar eru við uppá hugskotið alt fyri eitt, stilla seg gleðiliga upp og mestum rópa setningin við eldhuga. Aðrar eru meir kroystar, standa gráar í andlitinum og siga setningin á ein næstan mekaniskan hátt fyri at vísa, at tær ongan lut eiga í honum.

Aftur her verður markið millum list og veruleika togað og tambað. Vit og kvinnurnar vita, at útsøgnin ikki botnar í veruligum kenslum, at tær hava fingið boð um at spæla sjónleik til æru fyri upptøkutólinum, og at fleiri av kvinnunum ikki kundu funnið uppá at brúkt ein slíkan setning nakrantíð. Men mátin, tær siga setningin, avdúkar samstundis kenslurnar hann vekir í teimum, á ein hátt so sjónleikurin í sær sjálvum verður autentiskur.

"I'm so fucking happy" stendur eftir sum ein slag av fyribils speiskum punktum í einum langum spæli við mørkini millum tað veruliga og tað pallsetta, tað erliga og tað konstrueraða, tað privata og tað almenna. Tað hevur list gjørt fyrr, og í so máta flytur Territorial Statements neyvan nøkur listasøgulig mørk. Men framsýningin er áhugaverd, tí hon er so jarðbundin og insisterar uppá, at list oftast hendir, har tú minst væntar tað - nakað, sum tær báðar listakvinnurnar hava gjørt til sítt listarliga sereyðkenni, og sum fekk rættiliga nógva umrøðu, tá tær fluttu listina út á gøtunar í Esbjerg herfyri. Ein ummælari tók soleiðis til:

"Tá myndlistakvinnurnar Johnsen & Nielsen seta upptøkutól og ljós upp í smogum og sýnisgluggum í Esbjerg, broytir nýggja og óvanliga samansetingin týdningin á støðunum. Frá at vera ein sniðgøta, millum tvær gøtur, sum hevur til endamál at vit kunnu koma skjótari fram, verður smogan til eitt hugtakandi listaverk. Við uppsetingunum umskapa tær smogurnar til verk, vit ikki sleppa undan at traðka inn í, um vit annars vanliga ferðast í hesum rúmum. Men áðrenn vit velja at uppliva tey sum myndir, kunnu vit ikki fata hesi rúmini sum list. Og harvið eru vit aftur við valið. Listafólkið og áskoðarin hava her eitt felags ørindi. Tí tað er bara, tá vit velja at hyggja at einum verki sum list, at tað veruliga verður til sum listaverk.. Velja vit tað, kunnu vit í listaverkunum hjá Johnsen og Nilesen førka okkara vanamyndir av verðini, merka at vit eru til og hugsa um, hvar okkara pláss í verðini er."